# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Varaleiðari til Sjúkraflutningstænastuna

Á Sjúkraflutningstænastuni er starvið sum varaleiðari leyst at søkja til setan 1. oktober 2008 ella eftir avtalu.

Starvsøkini fevna um Streymoy, Eysturoy, Vágoy og Sandoy við umleið 35 starvsfólkum. Deildin hevur 14 bilar, íroknað 10 sjúkrabilar. Vaktsentralurin, ið hoyrir til deildina er saman við sjúkrabilunum á hvørjum starvsøki mannaður alt samdøgrið. Hartil hoyrir vekslarin/pílikurnar undir deildarleiðaran, har 8 fólk starvast.

**Arbeiðsuppgávurnar á Sjúkraflutningstænastuni umfata í høvuðsheitum:**
- ambulansuútkall við bráðfeingis lívbjargandi arbeiði
- portørarbeiði á Landssjúkrahúsinum
- vanligan sjúkraflutning millum heim og sjúkrahús av m.a. blóðgevum, rørslutarnaðum v.m.
- sjúkraflutning til og frá flogvøllinum
- vaktsentralin

Deildin hevur ein týðandi leiklut í samband við tilbúgvingina í Føroyum.

Starvið sum varaleiðari hevur við sær tvørfakligt samstarv við aðrar leiðslur og starvsbólkar bæði innan- og uttanhýsis og hevur tilvísing til deildarleiðaran á Sjúkraflu tningstænastuni.

**Ábyrgdarøki hjá varaleiðaranum:**
- næsti maður deildarleiðarans og staðgongufólk, tá hann er burturstaddur
- eftir avtalu við deildarleiðaran verða leiðslu- og fyrisitingarligar uppgávur lagdar á varaleiðaran
- varaleiðarin skal eftir avtalu við deildarleiðaran luttaka í øðrum dagligum uppgávum m.a. portørarbeiði/ambulansuarbeiði
- skal luttaka í tilbúgvingararbeiði
- vera við til at menna og útbúgva starvsfólkini
- innsatsleiðari 4. hvørja viku

**Førleikakrøv:**
- góðkenda ambulansuútbúgving samb. galdandi krøvum
- góðkendur innsatsleiðari smb. galdandi krøvum (um tann, sum fær starvið ikki hevur hesa útbúgving, verður skipað fyri, at viðkomandi verður útbúgvin skjótast gjørligt)
- royndir innan leiðslu og fyrisiting
- royndir innan ambulansu- og tilbúgvingararbeiði
- royndir og áhuga fyri fakligari starvsfólkamenning
- evni til at skipa fyri við góðum úrslitum
- góð samstarvsevni og fleksibilitetur
- evni til at orða seg bæði munnliga og skrivliga
- sjálvstøðug/ur, kreativ/ur og hava visiónir
- síggja avbjóðingar fram um avmarkingar
- telduførleiki

Í samband við starvsfólkapolitikkin og virðisgrundarlagið skal tann, ið settur verður, lúka øll krøv, ið kravd verða, samstundis sum vit leggja stóran dent á trivnaða og menning.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Jákup Nolsøe, deildarleiðara á Sjúkraflutningstænastuni, tlf. 304500, lok. 1130 ella beinleiðis á tlf. 304503.

**Umsóknarfreistin er 11. juli 2008 kl. 12.00**

## Sjúkrarøktarfrøðingar til B7

Á B7 søkja vit eftir sjúkrarøktarfrøðingum til skiftandi vaktir á starvsbrøki 1,0 til setan 1. september 2008 ella eftir avtalu. Møguleiki er fyri lægri brøki:
- 3 føst størv
- 1 avloysarastarv vegna barnsburð til og við 28. februar 2009.

B7 er ein medisinsk deild, sum er nýumvæld. Deildin hevur hesar sergreinar: lungnamedisin, nefrologi, hæmatologi, apoplexi, rheumatologi og onkologi. Faklig menning við undirvísing og skeiðvirksemi innan serøkini heldur fram. B7 er eisini byrjað við tvørfakligari konferansu hvønn morgun. Aðrar fakligar áhugaverdar avbjóðingar, sum liggja fyri framman, verður implementering av THS á heystið 2008.

**Arbeiðsuppgávur í høvuðsheitum**
- røkt og viðgerð til sjúklingar innan áðurnevndu sergreinar

**Krøv til umsøkjaran**
- prógv sum sjúkrarøktarfrøðingur við góðkendari autorisatión
- fakligan áhuga innan medisinsku sjúkrarøktina
- góð samstarvsevni

**Vit kunnu bjóða**
- eitt dynamiskt og fjølbroytt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt, tvørfakligt samstarv
- ávirkan á fakliga menning
- innleiðslu

Fyrimun hava umsøkjarar við kliniskum royndum innan sergreinarøktina og viðgerðirnar innan serøkini á deildini.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Jónu Sigmundardóttir, deildarleiðara á B7 á tlf. 304500, lokal 6067, lsjonau@ls.fo ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102, lsasapo@ls.fo

**Umsóknarfreistin er 14. juli 2008 kl. 12.00**

## Onnur leys størv á Landssjúkrahúsinum
(sí meira á www.lsh.fo)

**Varaleiðari til Barnadeildina B5**
Umsóknarfreistin er 30. juni 2008 kl.12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingur til B8**
Umsóknarfreistin er 30. juni 2008 kl.12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingur til B6**
Umsóknarfreistin er 30. juni 2008 kl.12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingur til Kommunulæknavaktina**
Umsóknarfreistin er 1. juli 2008 kl.12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingur til Kommunulæknavaktina**
Umsóknarfreistin er 1. august 2008 kl.12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingur, heilsurøktari/pleygari til Psyk D1**
Umsóknarfreistin er 4. juli 2008 kl.12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingur til G1**
Umsóknarfreistin er 1. august 2008 kl.12.00

**Ljósmóðir**
Umsóknarfreistin er 4. juli 2008

**Fasa III útbúgving í intern medisin**
Umsóknarfreistin er 1. august 2008
Sí meira á www.laegejob.dk

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.
Tað er umsøkjarans ábyrgd at umsóknin er Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti.
Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:
Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO-100 Tórshavn







## Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM
- er sjúklingurin í miðdeplinum
- eru umleið 200 seingjarpláss
- eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
- eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
- eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
- er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo